# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

# Kapteynurin hevur mynstrað av

**Tað er sera ivasamt, um metið hjá Óla Johannesen, sum nú er fyrrverandi landsliðsspælari, nakrantíð fer at verða tikið**

FARVÆL
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



Óli Johannesen er givin á landsliðnum. Hetta varð greitt í gjár. Óli var ikki á listanum hjá venjaranum mánadagin. Sjálvandi var hann ikki vrakaður. Spælari, sum 82 ferðir hevur tænt føðilandinum – nógv flestu ferðirnar sum liðformaður – skal spæla seg av og ikki setast av.

Frágreiðingin um fráverúna næstu ferðirnar og um endaliga farvælið komu í gjár: Óli er so mikið illa plágaður av skaða í hælsinuni, at hann næstan ikki fær spælt. Tað sást, tá ið TB leygardagin vitjaði í Leirvík.

Ætlanin hjá Óla hevur verið at gevast, tá ið hendan undankappingin var av, men nú vildi kroppurin ikki meiri, og harvið gjørdist landsdysturin ímóti Skotlandi á Svangaskarði 6. juni tann síðsti hjá Óla. Orsaka av skaða varð hann ta ferðina útskiftur í 36. minutti.

Ta ferðina var Óli, sum spældi fyrstu ferð á landsliðnum ímóti Ísrael á Svangaskarði 5. august í 1992, fyri 82. ferðina á landsliðnum, og spurningurin er, um tað nakrantíð fer at eydnast nøkrum føroyskum spælara at røkka so høgt dystartal. Tað verður í hvussu so er ikki í næstu framtíð.

Jákup Mikkelsen (51) og Jákup á Borg (52) eru teir landsliðsspælararnir, sum eru honum næstir í dystartali og framvegis eru á liðnum. Teir báðir skulu spæla hvørja einastu ferð næstu fimm árini, um teir skulu hótta dystarmetið hjá Óla Johannesen.

## Í altjóða høpi

Óli Johannesen er 35 ára gamalur, og nú hann hevur biðið landsliðnum farvæl, er dystarmetið hjá honum eisini í altjóða høpi eyðsýnt.

Europeiski fótbóltsspælarin, sum oftast hevur verið á landsliðnum, er týski Lothar Matheus. Hann var 150 ferðir á landsliðnum. Hægsta dystartalið í Onglandi eigur málverjin Peter Shilton, sum spældi 125 ferðir, og í Norðurírlandi eigur málverjin Pat Jennings metið við 119 dystum.

Í norðurlendskum høpi eru tað eisini tveir málverjar, sum eiga metini. Thomas Ravelli vardi 143 ferðir málið á svenska landsliðnum, og Peter Schmeichel vardi danska málið 129 ferðir.

Í Íslandi eigur miðvallarin Runi Kristinsson metið við 104 landsdystum, og í Noregi eigur Torbjørn Svensson metið við 104 landsdystum. Hetta er sama dystartalið, sum Michael Laudrup, ið eigur næstflestar dystir fyri Danmark, rakk. Morten Olsen spældi 102 landsdystir.

Í Noregi eigur verjuspælarin Henning Berg næsthægsta talið. Hann hevur spælt 100 landsdystir. Næstflestar dystir fyri Ísland hevur Guðni Bergsson spælt (80) ella tveir færri enn Óli Johannesen. Felags fyri allar teir omanfyri nevndu er, at teir ikki longur spæla á hægsta støði.

Átta danskir landsliðsspælarar hava verið oftari á teirra landsliði, enn Óli Johannesen hevur verið á føroyska landsliðnum. Nummar níggju á danska listanum er Brian Laudrup, sum segði farvæl, tá ið hann hevði verið 82 ferðir á landsliðnum ella eftir sama dystartal sum Óli Johannesen.

Tað setur avrikið hjá nú fyrrverandi liðformanninum á landsliðnum, Óla Johannesen, í serligt høpi, tá ið tikið verður við, at Danmark síðani 1984 so ofta hevur luttikið í endaspølum. Føroyar hava ongantíð tikið lut í endaspølum.

**1. deild**
**24. umfar 22. september**

**TB-SÍ 5-0 (2-0)**
1-0: Olivur Abrahamsen 41.
2-0: Gunnleif Olsen 44.
3-0: Sasa Jovanovic 51.
4-0: sjálvmál 57.
5-0: Sasa Jovanovic 83.

**HB-LÍF 1-4 (0-1)**
0-1: Andrias Lava Olsen 39.
0-2: Beinir Justinussen 53.
0-3: Adrian Joensen 66.
1-3: Yohan Borðoy 79.
1-4: Andrias Lava Olsen

**FSV04-ÍF 1-5 (1-1)**
1-0: Súni Fríði Barbá 20.
1-1: Helgi L. Petersen 45.
1-2: Nenad Saric 51.
1-3: Frank Poulsen 64.
1-4: Dánial Pauli Højgaard 87.
1-5: Dánial Pauli Højgaard 90.

**B36-B68 0-1 (0-0)**
0-1: Jann Ingi Petersen 83.

**KÍ-NSÍ 3-4 (0-1)**
0-1: Jann Martin Mortensen 36.
1-1: Fríðin Ziskason 48.
1-2: Klæmint Olsen 52.
2-2: Eyðun Klakstein 59.
2-3: Fróði Jóanesarson 61.
2-4: Fróði Jóanesarson 79.
3-4: Álvur F. Christiansen 85.

**25. umfar 29. september**

**B68-FSV04 3-2**
0-1: Heron 10.
1-1: Dánial Hansen br 43.
1-2: Sigtór Petersen 55.
2-2: Dánial Hansen 73.
3-2: Arnbjørn Danielsen 90.

**ÍF-HB 7-0 (4-0)**
1-0: Atli Petersen
2-0: Atli Petersen
3-0: Bartal Eliasen
4-0: Dánial Pauli Højgaard
5-0: Dánial Pauli Højgaard
6-0: Nenad Saric
7-0: Bartal Eliasen

**LÍF-TB 0-3 (0-1)**
0-1: Olivur Abrahamsen 30.
0-2: Olivur Abrahamsen 79.
0-3: Olivur Abrahamsen 90.

**NSÍ-B36 1-1 (0-1)**
0-1: Høgni Eysturoy 20.
1-1: Øssur Dalbúð 70.
Reytt kort: Bárður H. Joensen, B36, 79. (tvey gul)

**SÍ-KÍ 1-0 (1-0)**
Georg Haraldsen 30.
Reytt kort: Ingi Ole-Jacobsen, SÍ, 85.

1. deild

| | D | v | j | t | mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. B68 | 25 | 22 | 2 | 1 | 74-18 | 56 | 68 |
| 2. ÍF | 25 | 17 | 4 | 4 | 77-21 | 56 | 55 |
| 3. FSV04 | 25 | 15 | 3 | 7 | 45-35 | 10 | 48 |
| 4. TB | 25 | 13 | 4 | 8 | 52-26 | 26 | 43 |
| 5. LÍF | 25 | 13 | 1 | 11 | 62-43 | 19 | 40 |
| 6. NSÍ | 25 | 9 | 2 | 14 | 43-62 | -19 | 29 |
| 7. HB | 25 | 9 | 2 | 14 | 35-54 | -19 | 29 |
| 8. SÍ | 25 | 7 | 3 | 15 | 32-60 | -28 | 24 |
| 9. KÍ | 25 | 5 | 2 | 18 | 26-63 | -37 | 17 |
| 10. B36 | 25 | 2 | 3 | 20 | 20-84 | -64 | 9 |